Vilja sjálvstýri við øðrum arbeiðshátti

Tað, sum skilir Javnaðarflokkin frá samgonguni í fullveldismálinum er millum annað, at samgongan vil taka fullveldi í einum, meðan Javnaðarflokkurin vil loysa stig fyri stig

JOHN JOHANNESSEN

Javnaðarflokkurin skrivaði tilmæli í fullveldismálinum saman við Sambandsflokkinum. Men kortini vil hann føroyskt sjálvræði, bara ikki á sama hátt, sum samgonguflokkarnir.

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, viðgongur, at tað, sum skilir Javnaðarflokkin mest frá samgonguni í fullveldismálinum er sjálv mannagongdin í sjálvstýristilgongdini.

– Samgongan ynskir at staðfesta føroyskt fullveldi og taka yvir øll mál alt fyri eitt. Síðani skal hon samráðast um at fáa danir at umsita tey øki, vit sjálvi ikki megna at umsita.

– Harafturímóti vil Javnaðarflokkurin, at vit samráða okkum til ein sáttmála,ið sigur, at vit so líðandi yvirtaka tey mál, vit megna at umsita. Øllum hesum málum skal Føroya Løgting hava evsta vald á, og eingin avmarking skal vera fyri, hvørji mál skulu kunna yvirtakast. Hetta er ein varislig gongd,ið so við og við víðkar um føroyska sjálvstýrið, sigur formaður Javnaðarfloksins.

Hvílir í danskari vælvild

Jóannes Eidesgaard heldur ætlan samgongunnar vera ógvuliga ótrygga. Hann vísir á, at tað ikki er vist, at danir vilja taka ímóti málum at umsita fyri føroyingar, eftir at føroyingar hava tikið fullveldi og sostatt yvirtikið hesi mál.

– Hetta uppskotið hvílir fulkomiliga í danskari vælvild. Vilja danir ikki umsita tey fyri okkum, so noyðast vit at umsita tey sjálvi, hóast vit hvørki hava pening ella orku til tess.

– Samgongan gongur út frá, at tey rættindi, ríkisfelagsskapurin náttúrliga gevur, skulu halda fram eftir loysingina. Men hett hvílir bert á danskari vælvild.

Harafturímóti heldur Jóannes Eidesgaard, at alternativið, Javnaðarflokkurin hevur til fullveldisætlanina, tryggjar okkum at danir umsita tey málini fyri okkum, sum vit ikki megna at umsita.

– Eftir okkara uppskoti verða málini jú yvirtikin eitt fyri og annað eftir, so hvørt vit hava orku til at umsita tey. Hetta tryggjar okkum, at vit ikki koma í trupulleikar av teimum.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at hetta í veruleikanum merkir, at munurin millum samgonguna og Javnaðarflokkin er, at Javnaðarflokkurin ikki vil loysa fullkomuliga frá Danmark. Ríkisfelagsskapurin og tey náttúrligu rættindini, hann gevur, skulu varðveitast.

Rættindini, sigur formaður Javnaðarfloksins vera, at tað skal bera til at lesa í Danmark og samstarva á nógvum øðrum økjum, uttan at spurnartekin verður sett við hetta.

– Ríkisfelagskapurin inniheldur nøkur virði,ið ikki kunnu roknast um til pening. Og tað er ógvuliga umráðandi, at vit kunnu varðveita hesi virði, sigur Jóannes Eidesgaard.

Evsta vald umráðandi

Sum skilst á Jóannesi Eidesgaard er tað eins umráðandi fyri Javnaðarflokkin at fáa evsta vald, sum tað er hjá samgonguflokkunum.

Munurin er kortini, at Javnaðarflokkurin vil hava evsta vald á ymisku málsøkjunum, so hvørt tey eru yvirtikin, meðan samgongan fer til Danmarkar at samráða seg til ein sáttmála,ið sigur, at Føroyar taka yvir øll mál í senn, og at Føroya Løgting tískil fær evsta vald á teimum øllum samstundis.

Í uppritinum til ríkisrættarligu samráðingarnar vísir landsstýrið á nøkur ávís mál, ið landsstýrið vil samstarva við danir um, hóast vit eru vorðin sjálvstøðug.

Hesi mál eru millum annað verja, valuti og kongshús. Eisini skulu vit samstarva um yvirskipaðan uttanríkispolitikk eina tíð.

Tó leggur landsstýrið dent á, at vit skulu hava evsta vald í øllum málsøkjum.

Málini, Javnaðarflokkurin heldur, vit ikki eru før fyri at yvirtaka, eru júst tey somu. Hesi málini heldur hann vera ein púra náttúrligur partur av ríkisfelagsskapinum, og tí heldur hann ikki, at nakar trupulleiki fer at verða av, at danir umsita hesi mál fyri okkum, fáa vit sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin.

– Tað er millum annað hetta ríkisfelagsskapurin merkir fyri okkum. Síðani er ríkisfelagsskapurin eisini tað tætta samtarvið millum Grønland, Danmark og Føroyar, ið er knýtt saman bæði søguliga og við familjubondum.

– Skulu vit loysa frá Danmark og síðani samráðast um samstarv, skulu vit rokna við, at koma at standa í bíðirøð eins og onnur lond. Tá fara danir nevniliga ikki, at taka okkum fram um onnur, sigur Jóannes Eidesgaard.

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins

Reyni Service spreingir út

Fyri at betra um parkeringsumstøðurnar við bygningin, fer Reyni-Service í næstum undir at spreingja út omanfyri framsýningarhøllina

JÁKUP MØRK

Síðani búskaparliga kreppan hæsaði av miðskeiðis í nítiárunum, er virksemi her á landi økt rættuliga nógv.

Ein av teimum vinnugreinum, sum tá rættuliga tók dik á seg, var bilasølan, sum nærum hevði staðið í stað síðani seinast í áttatiárunum.

Ov trongt

Reyni-Service uppi í Hoyvík, er einki undantak í so máta, og ein av avleiðingum av øktu søluni hjá teimum hevur verið, at tað ofta tyikist heldur trongligt á parkeringsøkinum framman fyri bygningin, har brúktir bilar, bilar hjá starvsfólkum og bilar, sum skulu á verkstaðin, hava staðið.

Fyri at betra um umstøðurnar, hevur Reyni-Service nú gjørt av, at spreingja út omanfyri bygningin, soleiðis at nýtt parkeringsøki skal gerast.

Ætlandi skal nýggja parkeringsøkið gerast ájavnt framsýnignarhøllini í hædd, soleiðis at hetta lættir um atgongdina hjá viðskiftafólki. Koyrandi verður sostatt til framsýningarhøllina í báðum borðum.

Har umframt er so eisini ætlanin, at bilar hjá starvsfólki og bilar, sum skulu á verkstaðin, skulu standa á nýggja økinum, soleiðis at ruddiligari og víðari verður út móti vegnum.

Liðugt í summar

Eivind av Reyni, stjóri hjá Reyni-Service, sigur við Sosialin, at perkeringsøkið hevur verið í minna lagið seinnu árini. Tískil hava teir í eina tíð havt í umbúna at víðka um parkeringsøkið, og nú grannin, Balslev, fer í holt við líknandi spreingiarbeiði, er so líka til, at alt verður gjørt um eina leið.

Víðari greiðir Eivind frá, at tað enn ikki er avgjørt, nær arbeiðið skal gerast, men hann vónar at hetta verður liðugt tá tað fer at líða móti sumri.

Grækarismessuhald í Havn

Sunnudagin 12. mars kl. 15.00 verður Grækarismessuhald á Vaglinum. Skótarnir ganga skrúðgongu og Havnar hornorkestur spælir. Bjarni Beck, prestu flytur fram rødu.

Allir skótar í Havnini skulu møta ein tíma áðrenn í skótahølum sínum.

Skrúðgongan ferð frá Vágsbotni kl.14.15, og gingið verður eftir Bøgøtu-Tróndargøtu-Niels Finsensgøta-oman á Vaglið.

Danir hava eftir øllum at døma spart pengar við at brúka Føroyar og Grønland í NATO-høpi

Hernaðarmálið ein av trumfunum

Landsstýrið hevur gjørt eina nýggja útrokning av, hvussu nógv Danmark hevur spart í hernaðarútreiðslum, tí teir hava latið Nato ráða yvir føroyskum landaøki. Hendan útrokning skal brúkast í samráðingunum við danir

EYFUN KLAKSTEIN

Landsstýrið hevur gjørt eina meting av, hvussu nógvar pengar danir hava spart í hernaðarútreiðslum, tí teir hava brúkt Føroyar sum ein part av gjaldinum fyri limaskapin í NATO.

Og hesar upplýsingar ætlar landsstýrið at nýta í samráðingunum við danir, sum verða um eina viku.

Landsstýrismaðurin í fullveldismálum, Høgni Hoydal, váttar, at hendan útrokningin júst er gjørd, og at hon nú skal leggjast fyri landsstýrið. Áðrenn tað er gjørt, vil Høgni Hoydal einki siga um innihaldið í metingini.

– Vit hava gjørt hesa útrokningina fyri at vísa á eitt dømi um, at tað ikki bara eru danir, sum hava latið til ríkisfelagsskapin, sigur Høgni Hoydal.

Metingin hjá landsstýrinum er gjørd við hjálp frá serkønum fólki.

Trivalig upphædd

Ein av týðandi spurningunum í fullveldismálinum er, hvussu langa skiftistíð danir vilja lata føroyingum. Føroyingar vilja hava so langa skiftistíð sum gjørligt, meðan danir áðr hava úttalað seg um, at teir ikki eru sinnaðir at lata nakra serliga skiftistíð.

Tí kann eitt føroyskt krav um endurgjald fyri at hava verið brúkt í hernaðarligum samanhangi í NATO, koma at hava týðandi leiklut í hesum samráðingum.

– Útrokningin er gjørd við støði í teimum upplýsingum, sum komu fram í Svørtubók, sigur Høgni Hoydal.

Danskir ráðharrar hava váttað, at danir hava spart hernaðarútreiðslur, tí teir hava havt Føroyar og Grønland at lata, og onkur hava eisini roynt at rokna út, hvussu nógvar pengar danir hava spart. Hesi eru komin til trivaligar milliardaupphæddir.

Uttanlandnevndin eftirlýsti málið

Tað er útrokningin hjá landsstýrinum helst eisini komin til, men Høgni Hoydal sigur, at talan er um eina varisliga meting.

Hann sigur, at hendan útrokningin er í tráð við ynski hjá tveimum av minnilutunum í uttanlandsnevndini, sum hava eftirlýst hernaðarmálið í uppritinum. Og varaløgmaður ætlar eisini at leggja upplýsingar fyri uttanlandsnevndina, um hon er áhugað í tí.

Bæði Jenis av Rana og umboðini fyri samgonguna í uttanlandsnevndini vísa í sínum tilmælum á, at hernaðarmálið eigur at verða brúkt í samráðingunum við danir. Hetta mál kann verða við til at tryggja Føroyum eina longri skiftistíð.

Eftirlýstu hernaðarmálið í uppritinum

EYFUN KLAKSTEIN

Tvey av teimum trimum tilmælunum hjá uttanlandsnevndini í fullveldismálinum eftirlýsa hernaðarmálið í uppritinum.

Málið, sum skapti so nógv kjak í fjørheyst, verður ikki upp á tunguna á teimum 29 A4 síðunum, sum uppritið er skrivað á, og tað undrast Jenis av Rana á.

Hann skilir ikki, hví hesi viðurskiftini ikki eru tikin við í uppritið, og hann heldur, at tað kanska skyldast innanhýsis ósemju í samgonguni.

– Miðflokkurin heitir á landsstýrið um at fáa greiði á hesum øki, og væntandi verða ítøkiligar ætlanir í tí sáttmálauppskoti, sum landsstýrið leggur fyri uttanlandsnevndina, áðrenn farið verður til samráðingar, sigur Jenis av Rana í sínum tilmæli til uppritið hjá landsstýrinum.

– Tær frágreiðingar, sum vit hava fingið í uttanlandsnevndini um, hví hetta týðningarmikla øki ikki er við í upprintinum, hava ikki verið nøktandi, sigur Jenis av Rana.

Rætti til endurgjald

Umboðini hjá samgonguflokkunum í uttanlandsnevndini mæla eisini landsstýrinum at taka hernaðarmálið við í samráðingarnar við danir.

Hergeir Nielsen, Jógvan við Keldu og Jákup Sverri Kass siga, at landsstýrið eigur at taka upp samráðingar við danir um føroyska rættin til endurgjald fyri at hava verið skotbjálvi undir kalda krígnum.

– Hetta endurgjald eigur at vera grundað á tað, ið seinni er komið fram um hesi viðurskifti, har Danmark hevur brúkt Føroyar og Grønland til at sloppið sær undan sær undan øðrum útreiðslum, sigur teir tríggir í sínum tilmæli.

HEIMA BIO

Sex Games

Bleeder

VIDEOTOP 10

VIKA 10

1 Runaway Bride
2 EDtv
3 Wild Wild West
4 Når godtfolk kommer til byen
5 Kærlighed ved første hik
6 Familie Terapi
7 Arlington Road
8 The Faculty
9 Forces of Nature
10 Bride of Chucky

Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

petur & petur 320870

STATOIL
støðirnar kring landið